gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Hvør fjøl farin á flot

**Flaggdagin varð nógva staðni av álvara farið undir fyrireikingarnar til nýggja róðrarárið**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Vikan, sum er farin, hevur av álvara kenst várlig. Smálombini fjølgast, og nógvir flytifuglar eru at síggja og hoyra. Í hesum vikuskiftinum verður farið undir fótbóltslandskappingina í 1. deild, og flaggdagurin hevur verið.

Tey mongu seinnu árini hevur tað í fleiri plássum verið siður, at kappróðrarbátarnir hava verið flotaðir flaggdagin. Hetta er ikki nakar gamal felags føroyskur siður. Tað sigst, at hetta fyribrigdið er komið frá Havnar Róðrarfelag, og at tað síðani er vorðið vanligt í fleiri øðrum róðrarfeløgum at flota bátarnar flaggdagin.

Tann fyrsta av teimum seks róðrar stevnunum verður eitt sindur seinni í ár, enn hon plagar at vera. Ofta er norðoyarstevnan um mánaðarskiftið mai og juni, men í ár er hon ikki fyrr enn 9. og 10. juni. Tað kemst av at hvítusunnudagur er ikki fyrrenn 3. juni. Ivaleyst halda tey í Klaksvík, at tað hevði verið ov tíðliga at havt norðoyarstevnuna longu 26. og 27 mai.

Men hóast tað eru seks vikur til fyrstu FM kappingina, so gongur tað við fullari ferð í fyrireikingunum til nýggja róðrarárið. Í fleiri feløgum vóru bátarnir flotaðir undan flaggdegnum, og nógva staðni hava tey í ein mánað ella meiri enn so gjørt ikki so lítið við styrkisvenjing og róðurvenjing við serligum tólum, sum eru ætlaðar til endamálið.

Áhugin fyri kappróðri tykist framvegis at vera stórur. Enn er einki ítøkiligt at frætta um, hvussu tað verður við luttøkuni í ár, men ivaleyst verður hon í hvussu so er á sama støði, sum hon hevur verið undanfarin ár. Í fleiri feløgum hava tey í vetur fingið nýggjar bátar. Onkrir av hesum eru longu flotaðir. Aðrar verður tað fram-vegis arbeitt uppá at seta í stand. Meðan hetta arbeiðið verður gjørt, venja manningarnar við gomlu bátunum. Tað verður avgjørt ikki hildið at vera venjingini til ampa.

Umframt norðoyarstevnuna verða fimm aðrar FM kappingar: jóansøkan verður 23. juni, eystanstevnan 30. juni, sundalagsstevnan 7. juli, vestanstevnan 14. juli, og róðrarárið endar leygardagin 28. juli, tá tað verður róð kapp á ólavsøku.



*Flaggdagin vóru fleiri bátar flotaðir fyri fyrstu ferð í ár. Her eru tað tær á Junkaranum, sum gera klárt at leggja frá landi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

B71-EB/Streymur:

# Nógv stendur upp á spæl

**Fótbóltur: Bæði á Sandi og í Sundalagnum siga teir, at tað stendur hampuliga væl til við fólkinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Felagsliðið hjá Eiði og Sundalagnum man helst fara at hava tað truplari í ár, og neyvan fara gleðisrópini at verða eins títt, sum tey vóru í fjør*

Kári Reynheim og sandoyingar skulu í morgin samstarva fyrstu ferð í landskappingini. Teir fáa vitjan av uppflytarunum úr EB/Streymi. Nýggja liðið skal spæla tveir dystir á útivølli, áðrenn teir sleppa at royna seg á Mølini.

Bæði í B71 og EB/Streymi ásanna teir, at tað hevur alstóran týdning at sleppa væl burturúr fyrsta dystinum. Á Sandi verður tað ikki mett at verða nóg gott, um teir ikki fáa øll stigini. Í EB/Streymi kunnu teir ivaleyst væl liva við javnleiki í morgin.

### Heilsustøðan er hampulig

Felags fyri B71 og EB/Streym er, at liðini ikki megnaðu at spæla seg víðari úr bólkaumfarinum í kappingini um løgmanssteypið. Síðsta vikuskifti vóru fjórðingsfinalurnar á skránni, og tá hildu bæði teir á Sandi og teir í EB/Streymi frí.

Hjá B71 hevur tað higartil í ár ikki staðið so væl til við fólki. Fleiri spælarar hava verið skaddir, og aðrir hava verið plágaðir av sjúku. Í hesi vikuni hava allir verið til venjingar. Kári Reynheim luttekur í venjingini. Hann spældi eitt sindur í steypakappingini, men tað er okkum ókunnugt, um hann fer at seta seg sjálvan á liðið í morgin.

Bergur Magnussen skal fyrstu ferð hava ábyrgdina av einum liði í landskappingardysti í bestu deildini. Felags fyri flestu spælararnar hjá EB/Streymi er, at teir hava ikki roynt seg í 1. deild áður.

Jón Sigurð Gleðisheygg er ein av teimum, sum hevur royndirnar. Hann var í fleiri ár álit í GÍ verjuni. Nú er hann í álopinum hjá EB/Streymi. Tað verður hann ivaleyst eisini í morgin, sjálvt um hann hevur havt trupulleikar við knænum. Somu trupulleikar hava Eyðfinn Joensen og Hallur Jacobsen havt, men teir vóna, at allir verða tøkir í morgi.

KÍ-GÍ:

# Hvørgin vil tapa í Klaksvík

**Fótbóltur: Klaksvíkingar vilja fegnir hava betri byrjan, enn teir høvdu í fjør, og eitt skert gøtulið fer ivaleyst eftir javnleikinum og kanska teprum sigri**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar vita ikki reiðiliga, hvat teir skulu rokna við. 2000 var eitt stórt fótbóltsligt vónbrot hjá teimum. Í ár hevur bogin ikki verið spentur so høgt. Fyrstu umførini í steypakappingini fleyt spælið væl, men so er stígur komin í. Kortini hava teir spælt seg í hálvfinaluna í steypakappingini, og tað er ikki so galið – halda teir.

Trý stig ímóti GÍ høvdu komið væl við, so hevur tað minni týdning, um góða spælið bíðar eina ella tvær vikur.

Klaksvíkingar hava mesta fólkið tókt. Eyðun Klakstein hevur ikki vant síðani týskvøldið. Hann hevur verið plágaður av koyktum fóti. Allan Joensen gavst at venja mikukvøldið, og hann vandi ikki hóskvøldið. Hann hevur trupulleikar við knænum, men teir rokna við, at hann fer at spæla. Jan Andreasen hevur verið burtur frá fleiri umfør í steypakappingini, men hann hevur vant hesa vikuna.

Stóri spurningurin í Klaksvík er, hvussu nýggi jugoslavin, Alexander Djordjevic, fer at roynast. Hann hevur vant síðani týskvøldið, men enn hava teir ilt við at rokna hann út. Tað verður ikki roknað við, at fremmandi maðurin verður ímillum teir fyrstu ellivu.

### Fleiri burturfrá

Í Gøtu er Hans Pauli Petersen leikbannaður. Hann fekk reytt kort í fjórðingsfinaluni ímóti NSÍ. Magni Jarnskor sá eisini reytt, men tað sigst, at tað kortið var ikki skrásett. Kortini er ivasamt, um Magni Jarnskor spælir. Hann hevur í fleiri vikur havt trupulleikar við lærkrikanum.

Óli Hansen varð skaddur í fótinum í Runavík. Hann hevur ikki vant í vikuni og verður ikki tøkur í morgin. Helgi L. Petersen varð eisini skaddur ímóti NSÍ, men hann fer at spæla í morgin.

# Soleiðis gekst

**Niðanfyri verður víst, hvussu úrslitini hava lagað seg, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í bestu mansdeildini seinastu fimm árini**

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 |
|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-GÍ | 2-1 | 0-0 | 4-2 | 4-5 | 1-0 |
| HB-B68 | 3-4 | 1-1 | 3-1 | 6-1 | 0-0 |
| VB-FSV | 6-0 | - | - | 4-1 | 2-0 |
| NSÍ-B36 | 2-3 | 1-3 | 2-0 | 1-2 | - |
| B71-EB/S | - | - | - | - | - |

gu t15 cyan15 magenta15

Vikuskifti

Nr. 81 • leygardagur • 28. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Aerosmith - gamlir menn vísa veg



Lesið á síðu 10-11



## Hvar fór kassagittarin?

Pástandurin, at føroyskur prix-tónleikur í ár var á serliga høgum støði, setur okkara tónleikasøgu í eitt undarligt ljós, skrivar Steintór Rasmussen millum annað í hesi grein um Prix Føroyar kappingina.

Lesið á síðu 4-5



## Børge eigur Matadorbilarnar

Lesið á síðu 6-7




## Fótbólts Føroyar vakna úr dvala

Nógv er broytt tey knappliga seksti árini, sum tað hevur verið kappast um føroyameistaraskapin í fótbólti

Lesið á síðu 8-9

# Jón Steffánsson er ein knassi

**Hóskvøldið 16. Apríl hevði Graduale Nobili - gentukór úr Langholtskirkju, konsert í Skt. Pauls kirkju í Keypmannahavn. Her heldur tann íslendska samkoman til, so tað var lagamanni at hava konsert her.**

*Frits Johannesen*

Hetta var eitt nýstovnað úrvalskór. "Stúlknakórið" taldi 25 sangarar, og eru hesir sangarar partvís úr ungdómskórinum Gradualekórs Langholtskirkju og úr Kór Langholtskirkju. Tær yngru eru úr ungdómskórinum, meðan tær eldru eru úr tí blandaða kórinum hjá Jóni. Felags fyri allar genturnar er, at tær allar samlar hava nomið sang í kirkjuni undir kønu hond Óløf Kolbrún Hardadóttir, konu Jóns Steffánssonar.

Kirkjan er rúmlig og ljóðhvøll. Her var høgt til lofta og vítt til veggja. Ljóðið lyfti seg upp undir bitarnar, slerdi upp í tróðrið og fylti kirkjurúmið við vælskúlaðum íslendskum ungdómsrøddum. Sælt er at hoyra ungar røddir. Tað ljósa, reina, óspilta tilfarið, sum liggur í røddunum, drívur fram yndistónar av kropsanda av fitligum smáum dropaljóði, ið høvur og bulur bera við sær. Tá ið lærdómur um rættan hugburð til sang hevur fest rót í innasta hugfarið hjá teimum ungu, kann nógv lata seg gera, og sera heppin var Jón við hesum kóri.





Tað er ein long leið at ganga, at fáa so gott ljóð úr hesum snøggu stelpunum. Sangur, tá ið hann er bestur, er yndisligasti tónleikur, sum hugsast kann. Altíð havi eg havt stóran tokka til a capella kórsang í kirkjum, sum hava gott eftirljóð. Meg minnist einaferð, eg var við Fuglafjarðar gentukóri í Sandnes og sang - eg hugsi hetta var í 1991 - løgdu vit leiðina til Stavanger ein dag og fóru inn í dómkirkjuna at vitja. Á skránni høvdu vit eitt gamalt lag frá 1550 av G. B. Martini. Vit stillaðu upp í kirkjuni og sungu. Tey ungu fingu eina uppliving, sum tey seint gloyma. Teir gomlu tónasmiðirnir vistu, hvat teir gjørdu, tá ið kirkjurúmið skuldi fyllast við klangfullum røddum. Flyrrandi eftirljóð rann í oyrað, og stendur hetta enn sum ein partur av eini uppliving, sum seint verður gloymd.

Skráin hjá Graduale Nobile var rúgvumikil og sera krevjandi. Kórið var ávegis til Kallundborg til kórkapping at kappast við 20 onnur evropeisk kór. Konsertin byrjaði klokkan seks og var klokkan føst í sjey, tá ið síðsta lagið varð sungið. Flestu løgini á skránni vóru kirkjutónleikur frá nýggjari tíð og sigast má, at oyrað hevur vant seg við hetta slag av tónleiki, og er blivið partur av uppfatanini av kórtónleiki, sum er eins natúrligt sum at syngja eitt tjóðlag og ein sálm.

Tað vóru serliga tvey løg, sum eg festi meg við, sum gav kórinum tann dám og ta dýbt, sum tað hevði uppiborið. Tað var finska lagið: On suuri sun rantus autius (Eg siti á strondini. Alt er kvirt..) – finskt tjóðlag – útsett fyri eins røddir av Matti Hyökki. Her rann ljóðið í kórinum við solistunum Árný Ingvarsdóttir og Dóra Steinunn Ármannsdóttir við vitið og skilið í musikaliteti í ein musiskan andadrátt har inn- og útsúðurin í kórinum rann av ungum, grønum greinum, sum bóru sevjumikla fruktir við sær í ljóði og tónum úr tónleikaandans megi. Væl var skapið millum solistar og kór – so yndisligt og so reint. Varðmaður kórsins, Jón Steffánsson, reið ikki sjóvarfallið av sær, men lyfti hesar ungu røddir upp á tað satið, har sum tulkingin av hesum lag átti sess. Knasandi gott og yndisligt.

Hitt lagið var Hosanna av normanninum Knut Nystedt. Her var ljóðið í kórinum sent avstað á eina ransóknarferð í norðurlendskum sniði við bylgjandi kyldum í kyllingum úr tónleikaheiminum. Tað gnelti í, og hetta ekspressiva lag var eingin undandøttur, tað rungaði í oyrunum so skart við hvørt, at onkur tók hendur upp fyri oyrað, men hvat, hetta var eisini tónleikur. Hugflogið loysti røð av tankum, um hvussu kórlistin ransakandi fer um allan heim í ymiskum búnum og vísir seg við duldari megi við at temja kenslur, vit og skil í sannari list. Og list var tað, sum Jón og fylgisneytar hansara bóru fram hesa kvøldarløtu. Tá ið kórsangur verður til list, slepst ikki longur. Tá er komið har til, at listin er kenningarmerkið hjá kórinum. Kórið er vorðið hagfast og gongur í góðum haga. Jón kann bera høvdið høgt, tí hetta var list og kórsangur á altjóða støði. Tá er ilt at sleppa longur, men tá hevur tú eisini rokkið langt og gjørt tína skyldu.